**SEMJA**

**MILLUM**

**REIÐARAFELAGIÐ FYRI FARMASKIP**

**OG**

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
**MASKINMEISTARAFELAG**
**FØROYA MOTORPASSARAFELAG**

Omanfyrinevndu partar eru samdir um hesar broytingar í verandi sáttmálum:

1. Lønin hækkar í sáttmálaskeiðnum soleiðis:

   | | |
   |---|---|
   | 1. mars 2009 | 3,22% |
   | 1. mars 2010 | 3,22% |

   Tó hækkar lønin í sersáttmálunum fyri smærri skip í frálandavinnuni við 6,44% hin 1. mars 2009 og ikki 1. mars 2010.

   Omanfyri nevndu lønarhækkingar kunnu ganga inn í lønina, um maskinmeistari/skipari/stýrimaður longu fær eina løn, sum liggur omanfyri samlaðu sáttmálalønina íroknað møguligar starvstíðarviðbøtur.

2. Eftirlønargjaldið, sum í dag verður goldið av reiðarínum, verður flutt yvir á manningina at gjalda, eftir at lønin er farin um afturhaldsskipanina. Lønartalvan verður broytt samsvarandi. Samstundis verða hesar broytingar gjørdar í sáttmálunum:

   Í sáttmálanum fyri FSN verður orðingin í §14 broytt til hesa orðing:
   "Reiðaríið flytir vegna manningina frá 1. mars 2009 7% til eina av báðum pørtum góðkenda eftirlønarskipan. 1. mars 2010 hækkar eftirlønarparturin til 8%. Eftirlønargevandi er grundhýran sambært lønartalvuni umframt tær viðbøtur, sum eru nevndar í §2, stk. 3 í sersáttmálanum fyri frálandavinnuna (Multipurpose standby, supply- og ankarhandler vessels)."

   Í sáttmálanum fyri MF verður orðingin í §3 broytt til hesa orðing:
   "Reiðaríið flytir vegna manningina frá 1. mars 2009 7% til eina av báðum pørtum góðkenda eftirlønarskipan. 1. mars 2010 hækkar eftirlønarparturin til 8%. Eftirlønargevandi er grundhýran sambært lønartalvuni umframt tær viðbøtur, sum eru nevndar í §2, stk. 3 í sersáttmálanum fyri frálandavinnuna (Multipurpose standby, supply- og ankarhandler vessels)."

   Tó verður eftirlønarparturin í sersáttmálunum fyri smærri skip í frálandavinnuni hin 1. mars 2009 5%. Henda orðing verður sett inn í §2 sum nýtt stk. 2:

*"Reiðaríið flytir vegna manningina frá 1. mars 2009 5% til eina av báðum pørtum góðkenda eftirlønarskipan. Henda skipan er sjálvboðin fyri menn, sum eru fyltir 55 ár, ella eru tilknýttir reiðarínum styttri enn 2 mánaðir. "*

Verandi stk. 2 verður flutt til stk. 3.

3. Sum kompensatión fyri tað, reiðarin vinnur við øktari afturbering av tí at eftirlønin verður flutt sambært pkt. 2, verða latnar hesar hækkingar:

a. Allar viðbøtur í §13 í sáttmálanum fyri FSN verða hækkaðar soleiðis:

| | |
|---|---|
| 1. mars 2009 | 300 kr |
| 1. mars 2010 | 100 kr |

b. Henda grein um einameistarar verður sett inn í sáttmálan fyri MF:

*"Fyri sigling í bólki 1, 2 og 3 verða latnar til einameistarar hesar mánaðarligu viðbøtur ístaðin fyri yvirtíð:*

| | *1. mars 2009* | *1. mars 2010* |
|---|---|---|
| *Bólkur 1* | *850* | *900* |
| *Bólkur 2* | *950* | *1000* |
| *Bókur 3* | *1050* | *1100* |

c. Skipsassistentarnir á 1. stigið hækkað meira enn yvirornaða lønarhækkingin við 1,76% hin 1. mars 2009.

4. Í sáttmálum fyri FSN og FMPF fyri smærri skip í frálandavinnuni verður ístaðin fyri verandi orðing í §4, stk. 2 sett henda orðing:

" *Um reiðaríið ynskir at fáa mann við aftur, skal hann boða honum frá hesum innan 7 dagar eftir at túrur er av.*"

Afturfyri hesa broyting hækkar daglønin útyvir vanligu lønarhækkingina við 0,56% hin 1. mars 2009.

5. Í sáttmálanum fyri MF verður henda orðing sett inn sum nýggj § 1 "*Hesin sáttmáli er bert galdandi fyri limir í Maskinmeistarafelagnum og Reiðarafelagið fyri Farmaskip.*" Fylgjandi greinar í sáttmálanum skifta nummar samsvarandi.

6. Viðvíkjandi § 7 í sáttmálanum fyri FSN verður henda orðing sett inn ístaðin fyri verandi orðing:
*"Stk. 1 Hevur skipari ella stýrimaður verið í reiðarínum í meira enn ½ ár, kann viðkomandi eftir avtalu við reiðaran hava makan við umborð í í mesta lagi 3 mánaðir um árið.*

*Stk. 2 Verður makin umborð í meira enn 3 mánaðir, verður kostpeningur goldin til skipið. Flutningsútreiðslur, ábyrgd og trygging eru reiðarínum óviðkomandi.*

*Stk. 3 Omanfyrinevnda er tó treyta av, at umstøðurnar umborð gera hetta gjørligt, og at skipið ikki er í vinnu, sum treytar serligar førleikar til tey, sum eru við skipinum. "*

Sama orðing verður sett inn í § 1, stk. 9 í sáttmálanum fyri MF, tó verður "maskinmeistari" sett inn ístaðin fyri "skipari ella stýrimaður".

7. Í §24 í sáttmálanum fyri FSN verður orðingin "samanlagt ikki er" sett ístaðin fyri "á ongan hátt". Harafturat verður orðið "skipari/stýrimaður" sett ístaðin fyri "skipari".

8. Orðingin í §16 í sáttmálanum fyri MF verður strikað, og ístaðin verður sett "Ivaspurningar um tulking av sáttmálanum verða at leggja fyri Fasta Gerðarrættin."

9. §25, stk. 2 í sáttmálanum fyri FSN, §17 stk. 3 í sáttmálanum fyri MF og síðsta reglubrot í sáttmálanum fyri Føroya Motorpassarafelag verður strikað.

10. Sáttmálaskeiðið verður frá 1. mars 2009 til 1. mars 2011.

Tórshavn, 18. mars 2009

**Fyri**
**Reiðarafelagið fyri Farmaskip**

Árnfinn V. Hansen, formaður

Kaj M. Petersen

Torleivur Mikkelsen

Jens Meinhard Rasmussen

**Fyri**
**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

Eyðstein Djurhuus, formaður

Regin Nónstein

**Fyri**
**Maskinmeistarafelagið**

Páll Hansen, formaður

Regin Olsen

Jóan Petur Patursson

Ólavur Gunnarson

**Fyri**
**Føroya Motorpassarafelag**

Petur Ove Vesturtún, formaður